## Gera aftur útferðir til Stóru Dímunar

Viðrar verður útferð gjørd til Stóru Dímunar við »Hvíthamri« av Sandi sunnudagin 15. juni. Farið verður av Sandi kl. 10.30. Teistin siglir av Gomlurætt kl. 9.45 og í Skopun er bussamband til havnina á Sandi. Túrurin byrjar í Sands Havn kl 10.30. Umborð er tað Jóan Petur Clementsen (bátasmiður), ið er skipari. Í Dímun verður gingið upp gjøgnum Kleivina saman við Dímunarbóndanum, sum eisini verður ferðaleiðari á oynni. Til túrin er tað gott at hava heit klæði við og matpakka. Túrurin verður einans sigldur, um veðrið er til vildar, sigur Sandoyar Kunningarstova. Har verður eisini sagt, at meldast skal til hjá teimum og at pláss er fyri 12 fólkum.

## Stakir uppihaldarar fáa nú ein eyka styrk

Lógin um barnaískoyti til stakar uppihaldarar er samtykt í Løgtinginum og kemur í gildi 1. september 2008. Fyrsta útgjaldið verður um mánaðarskiftið september/oktober. - Endamálið við lógini er at veita einum bólki í samfelagnum, sum ofta hevur torført við at fáa endarnar at røkka saman, ein fíggjarligan styrk. Barnaískoyti til stakar uppihaldarar er eitt av mínum hjartamálum, og eg fegnist um, at tað nú er eydnast at fáa lógina samtykta, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum. Barnaískoyti til stakar uppihaldarar er 6000 krónur um árið fyri hvørt barnið og verður útgoldið eftir umsókn. Almannastovan umsitur barnaískoyti og fer um stutta tíð at kunna um viðurskiftir í sambandi við at søkja ískoyti.

# Skjótari at fremja javnstøðu við lóg

**Allir fløskuhálsar, sum elva til at fólk ikki vilja flyta heimaftur, skulu burtur. Javnstøðan skal fremjast, og um neyðugt við lóg, sigur Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum**

JAVNSTØÐA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Frá kjakfundinum sum Kvinnufelagið skipaði fyri í Miðlahúsinum mánakvøldið*
*Mynd: Rigmor Dam*

- Tað er ikki javnstøða í Føroyum.

Hetta staðfestir Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum.

Hon heldur, at tá tað er so trupult at fáa javnstøðu millum kynini, so kann tað verða neyðgt at brúka løggávu, sum eitt amboð til tess at náa málinum um javnstøðu.

- Vit mugu ansa eftir, at vit ikki hava fløskuhálsar í samfelagnum sum gera, at fólk ikki venda aftur til landið at arbeiða og virka. Barnaansing er ein trupulleiki, røkt av eldri er ein annar trupulleiki, sigur Marita Rasmussen og heldur fram.

- Eg haldi í útgangastøðinum ikki, at tað er rætt at tvinga fólk til nakað sum helst. Men tosa vit eitt nú um javnstøðu, so kunnu vit skjótari fáa framt broytingar við at løggeva, sigur Marita Rasmussen.

Stjórin í Vinnuhúsinum vísir á, at í upprunaligu lógini um barsilsskipanina stóð, at mamman skal taka tær fyrstu 14 vikurnar.

- Tá vit soleiðis við lóg tvinga mammuna at taka hesar 14 vikurnar, hví kunnu vit so ikki eisini við lóg tvinga pápan at taka ein part - ella at foreldrini kunnu býta barnaburðarfarloyvistíðina millum sín soleiðis sum tað passar best til familjuna, spyr Marita Rasmussen, sum heldur, at tað hevði verið ein gongd leið fyri at fingið broytt hugburðin – og harvið gjørt eina slíka løggávu óneyðuga við tíðini.

Stjórin í Vinnuhúsinum heldur, at tað hevur stóran týdning, at land okkara sum samfelag er kappingarført við onnur lond.

- Og tá hugsi eg um øll møgulig viðurskifti. Javnstøða er eitt, búðstaðarmøguleikar og eldrarøkt eru onnur viðurskifti, sum mugu verða umleið á sama støði sum aðrastaðni. Er tað ikki tað, kunnu hesi viðurskiftini vera við til, at kvinnur ikki venda aftur til Føroyar.

Marita Rasmussen leggur dent á, at eitt nú javnstøða og barsilsskipan bara eru ein partur av heildini.

At vit hava havt javnstøðulóg nú í so mong ár hevur gjørt mun, heldur Marita Rasmussen.

Hon vísir á, at tilvitanin í vinnulívinum er størri um at seta fólk við ymiskum førleikum – og av báðum kynum.

- Eg haldi faktiskt, at sjálvt um vit ikki hava javnstøðu, so hevur støðan broytt seg síðstu árini. Tað, at vit hava javnstøðunevndina - ein stovn, sum fylgir við, tað hevur eina ávirkan. Vit síggja tað eisini, tá vit skulu tilnevna umboð til nevndir og ráð, so verður víst á javnstøðulógina. Tað haldi eg er ein postiv gongd. Javnstøðan er betri, enn hon var, og tað er so eitt úrslit, vit hava fingið burturúr higartil, heldur Marita Rasmussen, sum sannførd vísir á, at tað als ikki er nakar trupulleiki at finna kvinnur við førleika til ymsu nevndirnar og ráðini.

- Hesin trupulleiki er kortini størri í vinnuni enn í almennum samanhangi, sigur hon, tí í vinnuni eru ikki nógvar kvinnur at finna millum stjórar og leiðarar.

Hon vísir á tað faktum, at í okkara stóru vinnugreinum, fiskivinnuni, alivinnuni og í byggivinnuni, eru ikki nógvar kvinnur.

Hon sigur, at limirnar í feløgunum í Vinnuhúsinum eru fyritøkur, og har eru tað stjórarnir, sum umboða fyritøkurnar, tí eru ikki so nógvar kvinnur. Ein kvinna er forkvinna í einum vinnufelag, Gistingarhús- og Matstovufelagnum. Tað er Ása Johnsdóttir, stjóri á Hotel Hafnia. Harumframt eru kvinnur nevndarlimir í arbeiðsgevarafeløgum og vinnufeløgum.

Marita Rasmussen sigur, at um vit eru samd um, at tað er skilagott at hava javnstøðu millum kynini, og at tað er skilagott at brúka allar kreftir og allan ymiskleika, sum er í landinum, so er tað rætt at fremja javnstøðuna, og so gevur tað



*- Tá vit við lóg tvinga mammuna at taka tær 14 fyrstu vikurnar av barnsburðarfarloyvinum, hví kunnu vit so ikki eisini við lóg tvinga pápan at taka sín part, spyr Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum*

meining.

- Vit mugu alla tíðina hyggja eftir heildini, eftir familjulívinum hjá okkum. Og har eru so nógvir aðrir trupulleikar, so sum bústaðarmarknaðurin, sum er so einsháttaður. Skalt tú seta búgv, so noyðist tú at keypa hús ella íbúð fyri hasar tvær milliónir krónurnar, tí tú fært onga leiðuíbúð, uttan á privata leigumarknaðinum – og lutaíbúðir finnast ikki. Hetta eru týðandi viðurskifti, sum er partur av, at karmarnir ikki eru optimalir í Føroyum fyri ung fólk, sigur Marita Rasmussen.

Hon vísir eisini á, at ávísir samfelagsbólkar heldur ikki hava optimalar karmar í Føroyum - ikki bara samkynd, men eisini støk - og kanska eisini onnur, sum velja at liva sítt lív øðrvísi. Hvussu hava tey tað í Føroyum? og ber tað til at fáa lívið at hanga saman, um hugsað verður um viðurskiftini á føroyska búðstaðarmarknaðinum? spyr Marita Rasmussen.

- Eg haldi, at tað hevur týdning at tosa meira um heildina heldur enn bara um barsilsskipanina og javnstøðu. Tað verður helst lættari at tosa um javnstøðuna, tá javnstøðan er ein partur av tí samlaða kjakinum um, hvørji viðurskifti skulu fáast upp á pláss fyri at leggja viðurskiftini til rættis fyri barnafamiljur.

- Tá man sum barnafamilja verður trongdur, tí tú ikki fært pengar ella ansing, tá er tað javnstøðan, sum kemur undir trýst. Hvussu skulu tey fáa tað at fungera? Tá fyllir tað alt, tá hugsar man ikki um javnstøðuna, tí hvør er tað tá, sum oftast stitur heima? Tað eru kvinnurnar, tí tær tjena minni, sigur Marita Rasmussen, sum heldur, at ein partur av tí, at vit ikki hava javnstøðu í Føroyum er, at vit hava norðurlendska rekord í at arbeiða niðursetta tíð.

- Eg sigi ikki, at tað skal verða forboðið, fólk mugu sjálvi finna út av, hvussu tey skulu liva, men eg kundi hugsað mær, at hetta eisini ávirkar javnstøðuna, sigur Marita Rasmussen.

## Javnstøðukjak í Miðlahúsinum

Tað var á kjakfundi í Miðlahúsinum mánakvøldið, at Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum segði nøkur vísdómsorð. Vit hava hitt hana og biðið hana greitt lesarum okkara frá hesum eisini.

Á kjakfundinum var evnið annars barsilsskipanin, javnstøða og arbeiðsmarknaður. Tað var Kvinnufelagið í Havn, sum skipaði fyri fundinum.

Umframt vísdómsorðini frá Maritu Rasmussen, so vóru eisini fleir viðkomandi spurningar reistir, so sum, hvussu vit gera tað meira lokkandi at vera nýbakað barnafamilja í Føroyum? Hvussu laga vit barsilsskipanina til, so hon livir upp til nútíðar krøv? Spurningurin um javnstøðu millum mann og kvinnu var eisini reistur, og hvussu vit laga hetta til broytta arbeiðsmarknaðin.

Á skránni varð eisini peptalk við Kristionnu Winther Poulsen, forkvinnu í Javnstøðunevndini, og Jenny A. í Heiðunum segði sína hjartans meining um at vera í barsilsfarloyvi við tveimum smáum børnum, meðan karrieran sum Conference & Event Manager á Hotel Føroyum eisini krevur sítt.